Viðmerkingar:

## Til míni kæru náðisystkin

Nú vil eg royna eftir førimuni at vísa á samleikar í orði Guds, hvat Jesus er fyri okkum, hann sigur millum annað, eg eri breyð lívsins, uttan breyð kann man ikki liva á foldum, tað er lívsneyðugt at fáa føði um vit skulu liva.

Tá jødarnir vóru á ferð í oyðimørkini úr landinum Gosem í Egyptalandi, máttu tey eta breyð sum kom av Himli kalla manna, tey skuldu savna fyri ein dag í senn, so at neyðugt var tað fyri tey at savna hvønn dag líka neyðugt er tað í dag, at vit eta breyð lívsins sum er orð Guds. Eg eri Alfa og Omega, upphavið og endin, somuleiðis sigur hann, eg eri ljós heimsins, ein sum gongur í myrkri, veit ikki hvat hann kann snáva um, tað er neyðugt at hava ljós á ókendum leiðum. Vit eru himmalborgara eru tí fremmand í hesum heimi og mugu støðugt hyggja fram móti málinum, okkara heimland er himmalin har sum Gud hevur gjørt okkum ein stað til reiðar og tá hann er liðugur kemur hann aftur at taka okkum heim, har sum hann er, har skulu vit eisini verða til tíðir og allar ævir.

Eg eri vatn lívsins, tann sum drekkur av mær, skal í allar ævir tysta aftur, líka neyðugt sum breyðið, er vatnið fyri likamið, eins og dýrdarlikam Guds, tann sum drekkur av mær, skal aldrin tysta aftur, sum hann segði við kvinnuna við likams brunn.

Hann sigur eisini eg eri dyrnar tann sum kemur ikki ígjøgnum meg skal eg ikki koyra burtur, men tann sum klívur uppum, er tjóður og ránsmaður, eg eri tann góði Hirðin, sum gevur lív sítt fyri seyðin, vit eru seyðurin, sum hann røktar, hann fer frá teimum 99, út at leita eftir tí eina og ber hann hin í fylgið, tí hann elskar seyð sín og kemur hann á øllum leiðum sínum, men seyðurin kennir ikki rødd hin falska Hirðans, tí spjaðist hann, hann hevur ikki hjarta fyri seyðinum, men rýmir undan ábyrgdini.

Kæri vinur hetta er neyðugt, at kenna Frelsar okkara og vera honum líðin, vit mugu altíð eta lívsins breyð og drekka vatn lívsins, sum er orð Guds. Hann segði et likam mítt og drekk blóð mítt tað er sannur matur fyri sálina.

So vil eg ynskja øllum lesarum eitt gott og eydnuberandi ár 2000.

*Heilsan*

**Gunnar Joensen, Eiði**

## Aftursvar til Hergeir Nielsen



Millum manna er Hergeir Nielsen kendur fyri at hava orðið í síni makt og telist eisini millum teir frægu røðararnar á tingi, hóast ein langt frá altíð kann taka undir við tí, hann sigur.

Tá ein hoyrir Hergeir Nielsen á tingsins røðarapalli, dugur hann sum fáur, á góðum føroyskum sjálvandi, at velja sær orðini, sum bæði eru litføgur og mergjaði. Í grundini líkist hann ikki sørt partamanni sínum Torbirni Jacobsen, tó hann ikki brúkar so nógvan „diskant", sum Torbjørn. Lurtarin kann tá sjálvandi sita við einari kenslu av, at her er talan um ein mann, sum veit, hvat hann vil. Sum danir siga „en handlingens mand". Hesin fer ikki at geva skarvin yvir við tað fyrsta.

Men hyggja vit so eftir, hvussu væl sami løgtingsmaður hevur spælt síni kort í málinum um Suðuroyar Sjúkrahús, so verða øll, sjálvandi serliga suðuroyingar, stórliga skuffaði. Har hendi snøgt sagt einki, bert føgur orð, men eingin gerð.

Í Sosialinum í gjár roynir Hergeir Nielsen at bjarga tí í land, sum hann heldur stendur til at bjargast. men neyvan nakrantíð er Hergeir Nielsen komin so jánkasliga frá einum aftursvari, har hann krøkir seg til illgitingar, ósannindir og ósakligar niðurstøður.

Hann leggur fyri við, so sum Óli Breckmann mangan áður hevur gjørt, at leggja Javnaðarflokkin undir bæði líkt og ólíkt. Men hví skulu hesir báðir ultrakonservativu liberalistar ikki eisini líkjast á skrift? Tað fær illa verið øðrvísi.

Síðan tekur hann enn einaferð fram sítt egna bluffnummar við uppskotinum til eina eykajáttan til Suðuroyar Sjúkrahús. Fyrst sigur hann, at eg fekk eina áheitan um at standa saman við einum umboði úr hvørjum flokki sum uppskotsstilliar til uppskotið.

Eg fekk eitt nakið faks uttan nakra áheitan við nøkrum nøvnum, m.a. Jógvan við Keldu og Kára P. Højgaard og mínum egna. Trupulleikin hjá Hergeiri var, at hann hevði sent uppskotið upp á nakkan av teimum báðum samgongumonnunum og ivaleyst eisini øðrum, tí hvørgin samgongumaðurin vildi atkøða fyri og enn minni standa sum uppskotsstillarar. Bæði Jógvan og Kári ringdu til mín sama dag og søgdu, at teir vóru púra óvitandi um uppskotið hjá Hergeiri, og at støða teirra var óbroytt - teir atkvøddu ikki fyri og enn minni vórðu uppskotsstillarar.

Um Hergeir Nielsen og onnur vilja hava hetta staðfest einaferð aftrat, kunnu tey lesa greinina hjá Jógvan við Keldu í Dimmalætting í gjár.

So hatta var eitt bluffnummar, ein óvitaslig roynd at skøva út yvir egnu politisku ómegd.

Sannleikin var jú tann, at tað var ein maður, sum kundi syrgt fyri nóg stórari játtan til Suðuroyar Sjúkrahús, og hesin var Hergeir Nielsen. Um hann brúkti sína politisku lyklastøðu sum samgongumaður og gjørdi sum starvsfelagar sínir í Klaksvík, so hevði ongir trupulleikar verið.

Hergeir Nielsen kundi staðið fram og fyri einaferð skyld sett gerð aftan fyri síni annars vanliga vælvaldu orð, so fekk pípan heilt annað ljóð. Men tað megnaði hann ikki, og bluffnummarið við eykajáttanini hava vit øll gjøgnumskoðað. Hergeir átti kanska at farið til Klaksvíkar á skeið og lært, hvussu tingmenn í samgongu kunnu spæla síni kort skilagott.

Vágatingmaðurin Jóannes Nielsen saman við øðrum setti fram broytingaruppskot til Strandfaraskip Landsins, har eisini mánadagstúrurin hjá Smyrli kom við. Hvør, ið eigur æruna fyri hesum, tað veit eg ikki, men uppskotið fekk 23 atkvøður og varð samtykt. So tað ber enn til.

Sunnudagstúrin fingu vit ígjøgnum enntá sum andstøða í fíggjarnevndini, so tað skuldi tíansheldur borið til, tá ein situr í samgongu.

Síðan roynir hann at geva okkum í Javnaðarflokkinum skuldina av kleyvarskapi samgongunnar í pensjónsmálinum. Men ein og hvør kann lesa álitið frá minnilutanum i Trivnaðarnevndini og síggja ávaringarnar, sum andstøðan kom við um skilaleysa uppskotið, sum meirilutin ókritiskt gloypti heilum.

At enda og í yvirskriftini ger hann uppmøtingina hjá Javnaðarflokkinum á tingfundinum 22. des. til nakað heilt serligt. Men Javnaðarflokkurin skal ikki standa til svars fyri Hergeiri Nielsen um uppmøtingina, líka so lítið sum tað øvugta, men minnilutauppskotið í pensjónsmálinum fekk 12 atkvøður fyri og 18 ímóti. Vóru vit fullmannaði, so hevði uppskotið fingið 14 atkvøður fyri, men framvegis 18 ímóti, so einfælt er tað.

Tað er samgongan, incl. Hergeir Nielsen, sum ger av, hvat verður samtykt og felt - eisini tá tað snýr seg um eina eykajáttan til Suðuroyar Sjúkrahús.

**Jóannes Eidesgaard**
**løgtingsmaður**

## Vinir Ísraels fundir við Christian C. Svendsen

*Fríggjakvøldið 21.1.2000 kl. 19.30 og leygardagin kl. 15.30 fyrilesur Christian C. Svendsen á Hotel Hafnia og sunnudagin kl. 19.30 í Libanon í Sørvági.*

Evnini hann hevur valt at fyrilesa um eru:

1. Hvorfor er Jerusalem aktuelt stof i alverdens medier?
2. Frelsen kommer fra jøderne (Joh. 4. 22) Hvad mente Jesus?
3. Erstatningsteologien m.m.

Christian Svendsen kemur saman við konu síni Inge Regitze. Hann er blaðstjóri á blaðnum »Godt Budskab«, sum er tað sama sum ta gott 100-ára gamla »Kirkeklokken«, sum er vælkend í Føroyum.

Í 1975 varð í Danmark felagið »Dansk-jødist Venskab« stovnað, og er Chr. C. Svendsen formaður har og eisini blaðstjóri á blaðnum: »Israels Vægter«.

Tað er felagið: Vinir Ísraels í Føroyum, sum hevur boðið honum at koma til Føroyar. Felagið: Vinir Ísraels í Føroyum byggir á kristiligt grundarlag við áherðslu á bókstaviliga tulking av skriftini, men er ikki missionerandi í Ísrael. Felagið skal eisini vera óheft politiskt og vera óheft av øllum trúarbólkum.

Endamál felagsins er:

1. At upplýsa um bíbilska grundarlagið undir tilveru Ísraels sum land og sum tjóð.
2. At virka fyri røttum tíðindaflutningi um Ísrael og jødar.
3. At eggja til bøn fyri Jerusalem, Ísrael og jødunum.
4. At virka fyri góðum samstarvi millum Føroyar og Ísrael á øllum økjum,o g at virka fyri góðum grannalagi millum londini í Miðeystri.
5. At mótvirka antisemitismu.

Hetta er ein stórur munnbiti, men Ísrael hevur nógv og stór vandamál at stríðast fyri: Náttúru (land, vatn, oyðimørk), innflytarar, fíggjarstøðu, verju, grannar, trúarbólkar og mangt annað.

Landaøkið er lítið, alt, sum tað er, er á stødd við Jylland, og har búgv gott 6 milliónir fólk, og innflytarar úr øðrum londum eru mong 10.000 hvørt ári (til dømis 1999 vóru 60.000 innflytarir).

Landið hevur verið vanrøkt í mong hundrað ár, tá bert fáir jødar búleikaðust í tí fyrijáttaða landinum, so nógv er at gera at fáa landið í rætta náttúruleið aftur, serliga at gróðurseta nýggj trø er ógvuliga umráðandi, so oyðimørkin aftur kann blóma.

Vatn er eitt torført vandamál serliga í miðeystri. Næstan alt nattúrvatnið kemur norðaneftir og nógvir eru at gagnnýta tað, og nóg mikið er ikki til av tí. Til dømis kann nenvst, at Genesaret vatnið, sum er ógvuliga stórur partur av vatnnýtsluni í Ísrael, var minkað við 6 m. undir tað normala, so har skal regna nógv fyri at koma á rætt kjøl.

Innflytarir streyma inn í Ísrael, og verður tað nevnt 3. heimkoma jødanna. Henda heimkoma er stór og eisini heilt øðrvísi hinum báðum fyrru heimkomum, tí nú er tað ikki mest ungt frískt fólk, ið kemur heim aftur, men mest gomul, veik og ússalig fólk, sum skal pjøssast um og ikki røsk arbeiðsfólk.

Ísrael er umgyrt av fíggindasinnaðum grannum, og teirra landaøkið eitt bikorn at samanbera við landaøkið og fólkatal teirra fíggindasinnaðu grannanna, og tí er teirra verjuútreiðslur øgiligar, men hevur tú hugs aum, hvussu nógv hetta týðir fyri teir, men ikki minst fyri øllum okkum í vesturheiminum, at hetta lítla, kanska einasta demokratiska samfelag, hevur týtt fyri vesturheimin,o g teg føroying, hvør tú so ert. Skuldu vit ikki borið hesa tjóð á lógvum? Tú føroyingur hugsað teg tó um.

Mong onnur skilagóð dømir kundu verið førd fram, men lat tað vera nóg mikið hesuferð.

So kundi tú spurt, hvat vil pinkufelagið Vinir Ísraels í Føroyum í hesum orrustiganginum?

Jú, vit eru nøkur, sum gjarna vilja bera klípi niðan í garð,og sum túeist, so er klípið ofta lítið, men hvussu hevði garðurin staðið uttan eitt hóskandi klípi.

Okkara klípi í hesum førinum er

1. gróðurseta so nógv trø, sum gjørligt í Ísrael
2. hjálpa ungum tilflytarum í Ísrael, so teir kunnu mennas tí góðum uhvørvi og at enda vera góðir borgarir í Ísrael, Guðs fyrijáttaða landi og tjóð.

Skuldi tú havt hesa kenslu og áhuga ert tú vælkomin at gerast limir í felagnum: Vinir Ísraels í Føroyum. Tað er ikki kostnaðarmikið, men minst til at klípið ofta er tað altavgerandi.

Atgongdin til fundirnar hjá Chr. Svendsen er ókeypis, men ein kollekt verður samlað, tí tað er kostnaðarmikið at fáa kvalifiserað fólk uttaneftir at halda fyrilestrar. Eisini er møguleiki at keypa bøkur um Ísrael og útvalda fólk, jødarnar frá Hjørleif Gaard aftaná fundirnar á Hotel Hafnia.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

»Ja, eg flyti tey higar úr Norðurlandi og savni tey ytsta enda jarðar; millum teirra eru bæði blind og lamin, bæði konur ið eru við barn, og konur ið hava fingið ilt; sum stórur skari koma tey higar aftur. v. 10 »Hoyrið orð Harrans, tit tjóðir, og kunngerð tað á oyggjunum langt burtur - sigið: Hann, ið spjaddi Ísrael, skal savna tað saman og røkta tað, sum hirði røktar fylgi sítt«. Jer. 31.8 og 10.

**Eliesar Arge**
**formaður**

# Yngd

Nr. 1 2000 SOSIALURIN




## Vís hvør tú ert

Samrø›a vi› Hera Kragesteen sálarfrø›ing

sí›a 4 - 5

## Fekk teldubræv frá ví›agitnum tónleikara

sí›a 3

## Gysaranátt í Havnar BIO

sí›a 6

## Fløguummæli

baksí›an

